Hanna D. Andreassen

Fra: Familjufyrisitingin
Sendt: Thursday, January 18, 2024 09:49
Til: Maria Michelsen
Emne: Viðmerkingar frá Familjufyrisitingini til uppskot til broyting í løgtingslóg um barnavernd (barnaverndarlógin)

Kategorier: Gul kategori

Góða Maria,

Viðmerkingar til uppskot til broyting í løgtingslóg um barnavernd (barnaverndarlógin)

Viðmerking 1:

Um eitt barn, ið er yngri enn 18 ár, kemur í ta støðu, at ongin hevur foreldramyndugleikan, skal Familjufyrisitingin taka avgerð um, hvør skal hava foreldramyndugleikan, sbr. § 15 í lóg um foreldramyndugleika og samveru.

Orsøkirnar til, at eitt barn knappliga kann standa uttan nakran foreldramyndugleikahava, eru antin, at annað foreldrið hevði foreldramyndugleikan og doyr, ella at barnið hevði tveir foreldramyndugleikahavar, og báðir doyggja.

Um andlát førir við sær fyri eitt barn, at ongin hevur foreldramyndugleikan, skal Familjufyrisitingin við atliti at, hvat er best fyri barnið avgera, hvør skal hava foreldramyndugleikan yvir barninum sbr. § 15, stk. 3 í foreldramyndugleikalógini.

Tá ið ongin foreldramyndugleikahavi er, orsakað av, at annað ella bæði foreldrini eru deyð og bæði ella ein teirra hevði foreldramyndugleikan **og ongin søkir um at fáa foreldramyndugleikan**, er mannagongdin tann, at Familjufyrisitingin spyr barnaverndartænastuna ið barnið er fevnt av, um tey kunnu hjálpa Familjufyrisitingini við at finna ein skikkaðan umsøkjara.

Meginreglan er, at barnaverndartænastan vendir aftur við uppskoti um skikkaðan og/ella skikkaðar foreldramyndugleikahavar. Antin úr familjuni ella nærumhvørvinum hjá barninum. Barnaverndartænastan hevur síðan vegleitt hendan ella hesar at søkja Familjufyrisitingina um foreldramyndugleikan.

Familjufyrisitingin skal her viðmerkja, at tað ikki er ásett beinleiðis í barnaverndarlógini ella aðrari lóggávu, at barnaverndartænastan sum barnið er fevnt av, skal hjálpa Familjufyrisitingini við at finna skikkaðan umsøkjara. Tó hevur hetta verið siðvenja hjá ávikavist Ríkisumboðnum og nú Familjufyrisitingini orsakað av, at barnaverndartænastan, heldur enn Ríkisumboðið/Familjufyrisitingin, kennir viðurskiftini kring barnið. Umframt at foreldramyndugleiki ikki er ein borgarlig skylda, ið merkir, at Familjufyrisitingin ikki hevur heimild at áleggja nøkrum persóni at átaka sær foreldramyndugleikan, uttan viðkomandi vil søkja um tað.

- Familjufyrisitingin skjýtir upp, at greið heimild verður ásett í barnaverndarlógini um at barnaverndartænastan sum barnið er fevnt av viðvirkar til at finna skikkaðan/ar foreldramyndugleikapersón/ar. Td. við íblástri frá § 57 í Serviceloven, sum er orðað soleiðis:

§ 57. Hvis ingen har forældremyndigheden over et barn eller en ung, skal kommunalbestyrelsen i fornødent omfang medvirke til, at der udpeges en egnet indehaver af forældremyndigheden.
Stk. 2. Kommunalbestyrelsen skal endvidere i fornødent omfang medvirke til, at der udpeges en egnet indehaver af forældremyndigheden, når Familieretshuset til brug for behandlingen af en sag efter forældreansvarslovens § 15 a, stk. 1, anmoder kommunalbestyrelsen herom.

Um barnaverndartænastan sum barnið er fevnt av heilt óvanligt ikki finnur skikkaðan persón, ið vil søkja um foreldramyndugleikan, íkemur tann støðan, at ongin vil hava foreldramyndugleikan. Samstundis sum barnið **skal** hava ein foreldramyndugleikahava sbr. foreldramyndugleikalógin § 1. Tað áliggur sostatt

Familjufyrisitingini at taka eina avgerð um foreldramyndugleikan – tó uttan, at tað er ein borgarlig skylda at lata seg tilnevna til foreldramyndugleikahava.

Í slíkari undantaksstøðu kann Familjufyrisitingin eftir avtalu við fasta verjan, tilnevna ein fastan verja hjá Familjufyrisitingini til foreldramyndugleikahava.

Tað áliggur í løtuni sostatt ikki barnaverndartænastu at finna ein skikkaðan foreldramyndugleikahava. Hóast tað er óheppið, at ein fastur verji verður tilnevndur foreldramyndugleikahavi uttan at hava nakað persónligt tilknýti til barnið, so er tað í ávísum førum neyðugt. Tá verður talan um ein yrkisforeldramyndugleikahava, ið fær samsýning fyri arbeiðið. Í Danmark verður gjørt á sama hátt í slíkum førum. Talan er altíð um eina neyðloysn.

Viðmerkjast skal eisini, at tá ið ein fastur verji verður tilnevndur yrkisforeldramyndugleikahavi, tryggjar Familjufyrisitingin sær, at barnið annars fær neyðugu umsorganina frá øðrum persóni. Og um barnið er til fosturs, leggja vit til grund, at barnið fær ta neyðugu umsorganina umvegis fosturforeldrini og tað eftirlitið, sum barnaverndartænastan sum barnið er fevnt av og fosturforeldraskipanin hava av børnum, ið eru sett heiman. Hetta merkir, at tann umsorganarligi parturin av foreldramyndugleikanum ikki áliggur einum føstum verja, ið er tilnevndur yrkisforeldramyndugleikahavi.

Orsøkin til, at Familjufyrisitingin á ávísum førum avger, at ein av okkara føstu verjum skal vera foreldramyndugleikahavi er sostatt, at allir aðrir møguleikar eru troyttir og ongin annar møguleiki er, tvs. ein neyðloysn.

Ein fastur verji, ið verður tilnevndur yrkisforeldramyndugleikahavi, skal hava samsýning, og verða pengarnir tiknir av arvinum frá foreldrunum, um nakar er.

Viðmerking 2:

Barnaverndarlógin skilur í ávísum førum ímillum foreldur og foreldramyndugleikahava. Almannamálaráðið hevur upplýst, at tá talan er um foreldur meinast við løgfrøðilig foreldur, tí endamálið við lógini er at veita hjálp til barnið (og samstundis til foreldrini, sum barnið býr hjá, um ikki barnið verður varandi umsorganaryvirtikið).

Við foreldramyndugleika verður í barnaverndarlógini meint persónur/persónar, ið hava tær skyldur, ið fylgja av myndugleikanum, harímillum umsorgan, uppaling osv. Tvs.at ein yrkisforeldramyndugleikahavi fellur ikki natúrliga inn í lógina.

- Familjufyrisitingin skjýtur upp at greiða fæst á, hvussu hugtøkini ”foreldur” og ”foreldramyndugleikahavi” skal skiljast, tá talan er um yrkisforeldramyndugleikahava.

Vinaliga

Monica Hjelm Rasmussen
stjóri

FAMILJUFYRISITINGIN
THE FAMILY LAW ADMINISTRATION

Dr. Jakobsens gøta 21
100 Tórshavn
Føroyar

Tel +298 20 22 24
famf@famf.fo
www.famf.fo

Øll málsviðgerð í Familjufyrisitingini er fevnd av dátuverndarlógini. Meira kunning um hetta er at finna her.

From: Maria Michelsen <mariam@bumr.fo>
Sent: 10. januar 2024 17:29
To: bvs@bvs.fo; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Hjalti H. Dalheim <HHD@kambsdalur.fo>; kf@kf.fo; Løgmálaráðið <lmr@lmr.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Løgtingsins Umboðsmaður <lum@lum.fo>; Familjufyrisitingin <famf@famf.fo>; srfelag@gmail.com; pedagog@pedagogfelag.fo; info@sjukrarokt.fo; lararaf@lararafelag.fo; ljm.foroya@gmail.com; mail@psykolog.fo; heilsurokt@hrf.fo; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; megd@megd.fo; politi@politi.fo;

barnabati@barnabati.fo; vigdis@mea.fo; barnavernd@torshavn.fo; barnavernd@tvoroyri.fo; Barnaverndartænastan <barnavernd@runavik.fo>; Barnaverndartænastan <bvt@sunda.fo>; Sandoyar Barnaverndartænastan <bvtsandoy@bvtsandoy.fo>; bvt@vaga.fo; Barnaverndin Norðoyggjar <barnavernd@klaksvik.fo>; barnavernd@fuglafjordur.fo
Subject: Til ummælis - uppskot til broyting í løgtingslóg um barnavernd (barnaverndarlógin)

Til hoyringsspartarnar

Viðheft verður sent tykkum til ummælis *uppskot til broyting í løgtingslóg um barnavernd (barnaverndarlógin).*

Lógaruppskotið er grundað á ymiskar trupulleikar, sum hava stungið seg upp ígjøgnum tíðina, og sum gera tað ynskiligt at broyta lógina. Eisini hava myndugleikar og stovnar innan barnaverndarøkið gjørt vart við ávís viðurskifti í lógini, sum antin mangla ella ikki virka eftir ætlan. Endamálið við uppskotinum er sum heild at tillaga lógina og gera rættingar, sum bøta um lógina.

Hesar broytingar verða gjørdar:

1) Fakfólk í almennum størvum, og fakfólk, sum útinna virksemi vegna tað almenna innan barna- og ungdómsøkið, fáa møguleika at boða viðkomandi myndugleika í Danmark frá, um tey í sambandi við starv sítt fáa kunnleika til viðurskifti ella hava orsøk til at halda, at eitt barn, sum hevur bústað í Danmark, kann hava tørv á serligum stuðli ella hevur verið fyri ágangi, ella um eitt barn beint eftir føðing fer at fáa tørv á serligum stuðli vegna viðurskifti hjá foreldrunum. Talan er ikki um eina fráboðanarskyldu, men um ein møguleika at boða frá ávísum viðurskiftum um eitt barn til ein danskan myndugleika.

2) Tað verður møguligt hjá barnaverndarnevndini at veita aðra hjálp til barnið og/ella familjuna so sum ráðgeving, viðgerð, praktiskan og námsfrøðiligan stuðul ella líknandi. Endamálið er, at geva barnaverndarnevndini breiðri rammur í mun til at málrætta hjálpina og stuðulin til barnið og/ella familjuna, og gera tað møguligt at seta í verk fyriskipanir, sum ikki eru tiknar hædd fyri í uppreksanini av fyriskipanum í § 15, stk. 1, nr. 1-11. Slík fyriskipan kann verða sett í verk um neyðugt, hóast foreldramyndugleikin ikki loyvir tí.

3) Tað verður møguligt hjá barnaverndarnevndini at seta í verk fyriskipanir sambært § 15 fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Endamálið er, at stuðulin skal viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum eru orsøk til umsorganaryvirtøkuna, og á henda hátt hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman.

4) Tað verður møguligt hjá barnaverndarnevndini at taka avgerð um viðurskifti hjá barninum ella tí unga, sum er neyðug í mun til endamálið við heimansetanini, og sum er til barnsins besta. Hetta er neyðugt fyri at tryggja menningina, trivnaðin og heilsuna hjá barninum, at barnaverndarnevndin hevur atgongd til at taka neyðugar avgerðir um ávís viðurskifti hjá barninum.

5) § 42, stk. 2, nr. 5 verður strikað.

6) Møguligt verður at flyta eitt barnaverdarmál frá einari barnaverndarnevnd til eina aðra barnaverndarnevnd at umsita í heilt serligum førum. Endamálið er, at hjálpa einum barni og familju í heilt serligum førum, harí málið og støðan tykist so fastløst og vónleys, eins og samskiftið og samstarvið ímillum foreldur og barnaverndartænastuna er serstakliga vánaligt og torført, soleiðis at bæði foreldur og málsviðgerar føla seg í einari sera fastlæstari støðu.

Møguligar viðmerkingar skulu sendast til mariam@bumr.fo í seinasta lagi mikudagin 31. januar 2024.

Vinaliga/Kind regards

Maria Michelsen
Fulltrúi, cand.jur.

Office: +298 306500
Mobile: +298 555013
Mail: mariam@bumr.fo

BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education

J.H. Schrøtersgøta 7
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

www.bumr.fo